

## Fossadal vónbrotin

**Tá ið Helgi Fossádal í 2005 varð settur sum leiðari fyri Listasavn Føroya, mótmælti ein bólkur av etableraðumlistarfólkistarvssetanini, og ein partur av hesum listarfólkum hava síðani boykottað Listasavnið.**

**Høvuðsatfinningin ímóti Helga Fossádal var, at hann hevur ikki listfrøðisliga útbúgving, og tí var hann ikki egnaður sum leiðari fyri savnið, hóast hann í nógv ár hevði fylgt við í listarheiminum og hevði verið virkin í nevndum og fyriskipan av framsýningum.**

**- Tað var eitt stórt vónbrot, at nógv av hesum listarfólkunum, sum eg hevði havt eitt ógvuliga tætt tilknýti til, høvdu so nógv ímóti mær sum persóni.**



*- Vit hava ikki havt so góðar stundir til familjuna, sum vit høvdu ynskt okkum, men tað verður vónandi øðrvísi nú, sigur Henning Bøgesvang*

# Heim við blandaðum kenslum

**- Vit hava glett okkum at koma heim til Føroya, men tað er við blandaðum kenslum, at vit eru her, tí vit hava júst sagt farvæl til eitt arbeiði og fólk, sum vit hava verið góð við, sigur Henning Bøgesvang, prestur, sum nú er komin heim til Føroya at búgva og arbeiða**

Ein gamal kenningur er komin aftur til Føroya at búgva.

Henning Bøgesvang, sum í 21 ár var prestur í Klaksvík, er fluttur aftur til Føroya. Seinastu 10 árini hevur hann verið sjómansprestur í Gøteborg, men sunnudagin verður hann innsettur sum prestur í Sjóvar prestagjaldið. Tað starvið skal hann røkja næsta hálva árið.

*Men hvussu er tað so at vera heima aftur?*

- Vit hava bara verið í Føroyum í tveir dagar, so tað er eitt sindur ringt at siga. Tað er við blandaðum kenslum, at eg fari frá einum arbeiði í Svøríki, sum eg havi havt i 10 ár, og sum eg og konan hava verið sera glað fyri. Vit hava glett okkum at koma heim til Føroya, men tað er við blandaðum kenslum, at vit eru her, tí vit hava júst sagt farvæl til eitt arbeiði og fólk, sum vit hava verið góð við, sigur Henning Bøgesvang.

- Men vit siga, at vit koma heim til Føroya, og tað hava vit sagt allatíðina, meðan vit hava verið í Svøríki. Vit hava sagt, at nú skulu vit heim, og so spyrja tey, hvar er tað? Jú, tað er heim til Føroya. Vit hava búð í Føroyum í 21 ár, og tað er her, at vit hoyra til.

*Hví ert tú farin úr einum starvi í Svøríki, sum tú treivst so væl í?*

- Dópsbrævið er at farið tosa sítt týðuliga mál. Eg eri blivin 65 ár, og hóast eg kundi hildið áfram í starvinum í Gøteborg í nøkur ár afturat, so hava eg og konan verið samd um, at vit skuldu sjálvi finna hurðina. Vit skuldu gevast, meðan leikur var góður.

### Heim fyri at verða

Mánadagin kom Henning Bøgesvang aftur til Føroya, og sunnudagin verður hann innsettur í Sjóvar prestagjaldið, men tá ið hann fór av landinum fyri 10 árum síðani, var ætlanin ikki at koma aftur til Føroya at verða prestur.

- Ætlanin var ikki at koma heim til Føroya sum prestur, men sum pensiónistur. Men eg fekk ein fyrispurning frá bispi, um eg kundi taka eitt avloysarastarv í eitt hálvt ár, og tað kom sum boð úr himli, tí tað var eitt høvi hjá okkum at byrja pensiónistatilveruna í Føroyum. Eg eri ógvuliga takksamur fyri, at bispi spurdi meg, og at kirkjuráðini vildu hava meg sum prest.

Eru tit nú komin heim fyri at verða?

- Ja, vit hava bygt hús í Søldafirði, og tað er meiningin, at vit nú er komin heim fyri at verða.

*Hvat ætlar tú annars at brúka pensiónistatilveruna til?*

- Vit hava ommu- og abbabørn í Føroyum, sum vit vilja hava samband við, og tað sama er við nærmastu familjuni í Noregi, har hin sonurin hjá mær býr, og familjuni í Danmark. Vit hava ikki havt so góðar stundir til familjuna, sum vit høvdu ynskt okkum, men tað verður vónandi øðrvísi nú, sigur Henning Bøgesvang.

**» Tað ræður um at liva lívið fult út nú, tí framtíðin er ikki verd at bíða eftir.**

Jógvan Fríðrikson, bispur

**» Vit eru eitt føroyskt flogfelag við stórum F og fyri føroyingar, og tað mugu vit til eina og hvørja tíð taka atlit til.**

Magni Arge, stjóri í Atlantsflogi, á 20 ára degnum

## Meldurhvirla í Sumba

Sunnudagin varnaðust fólk í Sumba, at ein meldurhvirla nærkaðist Sumbiarhólmi. Hon var sermerkt, tí eisini sjálvur hvirilin sást í luftini. Hvirilin kom inn móti bygdini, og komin í mølina við Stórá, fann meldurhvirlan lægsta stað, og fylgdi síðani Stórá niðaneftir. Ongin skaði tykist vera hendur av meldurhvirluni. Ein kvinna í áttatiárunum gjørdi vart við seg fyri at vita, hvat var hent. Hon hevði ongantíð upplivað slíkt áður.

## Magn í søguna



Líka síðani Shell byrjaði at selja olju í Føroyum, hevur skip hjá felagnum flutt olju til landið. Í 1996 varð skip bygt til endamálið, men tað er nú farið í søguna.

- Tað loysir seg ikki longur hjá felagnum at flyta oljuna til Føroya við Magn, og tí hava vit gjørt av at selja skipið, sigur Hendrik Egholm, stjóri.

Norska reiðaríið Soltin Marin í Kopervik hevur keypt Magn, og við útflaggingini av oljuskipinum endar ein partur av føroyskari siglingarsøgu.

## Kann kosta dýrt

Verða Føroyar ikki partur av Kyoto, kemur útflutningsvinnan at svíða. Hetta sigur Jákup Pauli Joensen, stjóri í Umhvørvisstovuni. Í Føroyum verður lítið og einki gjørt fyri at minka um útlátið, meðan londini í ES gera alsamt meira bindandi avtalur

- Í Føroyum hava vit bara roynt at lata sum einki og vóna, at hetta gekk yvir. Men jú longur vit eru uttanfyri, jú tyngri verður tað at byrja. Og hetta gongur ikki yvir.

- Heldur føroyska dølskni fram koma vit at svíða bæði samfelgsliga og vinnuliga, tí vit verða útihýst úr tí góða selskabinum, staðfestir stjórin í Umhvørvisstovuni.